## Robbie Williams legði upp til stórsigur á Føroyum



Fríggjakvøldið hevði enska poppstjørnan Robbie Williams fyrru av tveimum útseldum konsertum á Hampden Park í Glasgow, og stívliga 50.000 fólk vóru komin á konsert.

Robbie Williams var í rætta essinum fríggjakvøldið, og hann legði upp til skotskan stórsigur á Føroyum í EM-dystinum dagin eftir.

– Brothers and sisters of Hampden Park, let me hear you if you think Scotland's gonna beat Faroe Islands 10-0 tomorrow, segði Robbie William og fekk eitt ordans brøl frá teimum stívliga 50.000 áhoyrarunum.

Í hálvleikinum var Skotland komið hálva leið til 10-0, men teir fingu bert eitt mál í seinna hálvleiki.

## Litava er ikki at spæla við

Eftir tveir 6-0 lúsingar eru tað ivaleyst tey, sum vóna, at tað skal ganga øðrvísi hjá Føroyum, tá ið mótstøðuliðið leygardagin 7. oktober á Tórsvølli verður Litava. Leygarkvøldið spældi Litava fyri fyrstu ferð í hesi EM undankappingini. Avrikið hjá Litava, sum spældi á útivølli móti italsku heimsmeistarunum, bendi avgjørt ikki á, at Føroyar standa fyri lættari uppgávu. Úrslitið í Italia var 1-1. Bæði málini vórðu skorað í 1. hálvleiki. Í 21. minutti legði Tomas Danilevicius Litava á odda, og níggju minuttir seinni javnaði Filippo Inzaghi fyri Italia.



*- Gamla frasan um, at tað eru eingir lættir dystir í altjóða fótbólti, umfatar ikki føroyska landsliðið, skrivar The Sunday Mail eftir dystin leygardagin. Eitt annað skotskt blað heldur, at eitt frískt lot hevði givið skotum meira mótstøðu enn føroyska landsliðið*

# Føroyar hava einki at gera í altjóða fótbólti

**Skotsku bløðini fara illa við føroyska landsliðnum, sum teir halda verða tað vánaligasta landsliðið í altjóða fótbólti í nógv ár. The Scotsman ivast í, um føroyingar yvirhøvur hava nakað at gera í EM og HM kappingum**

SKOTLAND-FØROYAR
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Skotar eru í sjeynda himli eftir stórsigurin á Føroyum leygardagin, men samstundis sum teir rósa skotsku spælarunum fyri avrikið, finnast teir harðliga at føroyska liðnum, sum teir kalla vánaligasta landsliðið í altjóða fótbólti í nógv ár.

– Skotland fekk eina øgrynnu av kjansum ímóti einum liði, sum fekk teg at kreppa tærnar og ivast í rættinum til at verða við í slíkum kappingum. Føroyar taptu 6-0 ímóti Georgia í síðsta mánaði, og aftur hesaferð taptu teir 6-0. Í næsta mánaði fara Føroyar til Fraklands at spæla, og tá kundi 6-0 verið eitt úrslit, men tit kunnu líta á, at hesin flokkurin er tann vánaligast, sum hevur verið í langa tíð, og eitt tveysiffrað tap bíðar fyri framman, skrivar The Scotsman eftir dystin leygardagin.

– Nakað eftir næsta málið hjá Skotlandi, fingu Føroyar tvey hornaspark. Annað varð skotið til málspark, og hitt var skotið inn í knæhædd. Beint eftir tað fingu føroyingar eitt frí-spark, sum var so illa tikið, at tú mátti flóvisliga hyggja burtur. Eitt lítið lot hevði givið Skotlandi meira mótstøðu enn Føroyar, skrivar blaðið.

### Spældu sum eitt feriulið

The Scotsman heldur, at føroyska liðið vísti seg als ikki at standa mát við tey lið, sum í undanfarum dystum hava givið Skotlandi trupulleikar

– Føroyar vóru verri, enn Walther Smith kundi havt ímynda sær í sínari bestu, fegnastu og mest optimistisku løtu farnu vikuna. Í fyrra hálvleiki skoraði Skotlandi eitt mál fyri 9. hvønn minutt, og á var dysturin blivin ein farsa, skrivar blaðið.

Eisini onnur bløð hava føroyska liðið til látur í sínari umrøðu av dystinum.

– Gamla frasan um, at tað eru eingir lættir dystir í altjóða fótbólti umfatar ikki føroyska landsliðið, skrivar The Sunday Mail, og kappingarneytin The Sunday Herald staðfestir, at sigurin leygardagin er tann størsti hjá skotum síðani 8-0 sigurin á Kypros í 1969!

Sunday Post skrivar, at Skotlandi kundi saktans havt vunnið meira enn 6-0 ímóti Føroyum, sum einki formáddu sær.

– Føroyar spældu meira at líkna við eitt feriulið úr teirra lokalu fiskarídeild, skrivar Sunday Post.

Staðfestast kann í øllum førum, at virðingin, sum seinnu árini hevur verið fyri føroyskum fótbólti í Skotlandi og aðrastaðni, er ikki at hóma í løtuni, og nú hava ósmæðu bløðini betur hug at gera gjøldur fyri føroyskum fótbólti.

## Skotland fekk ov nógv mál

**- Eg dugi ikki at síggja nakra orsøk til at geva venjaranum skuldina fyri hetta tapið, tí tað vóru persónligir feilir á vøllinum, sum góvu Skotlandi málini, sigur fyrrverandi landsliðsvenjari hjá Skotlandi**



*- Eg vóni, at Føroyar fara at standa seg betur enn í hesum báðum fyrstu dystunum og fara at fáa okkurt stig, tí tað hava Føroyar uppiborið, sigur Craig Brown, fyrrverandi landsliðsvenjari hjá Skotlandi.*

*Mynd: Eyðun Klakstein*

SKOTLAND-FØROYAR
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

(Glasgow): Craig Brown hevur fýra ferðir staðið á odda fyri skotska landsliðnum, sum hevur spælt ímóti Føroyum. Á heimavølli vann hann báðu ferð, men hann vann bara annan dystin í Føroyum. Hin endaði við javnleiki.

Craig Brown var viðmerkjari hjá BBC til landsdystin á Celtic Park leygardagin, og eftir dystin fingu vit orðið á tann fyrikomandi og fryntliga venjaran, sum hevur nógv gott at bera føroyingum.

– Skotland fekk nøkur løtt mál í dag. Mær dámar ikki at kritsera einstakar spælarar, men kanska hevði ein hepnari málmaður klárað at forða fyri onkrum av málunum. Eg havi sum venjari sjálvur spælt ímóti Jákup, og mær hevur altíð dámt hann sera væl sum málmann, men hann var eitt sindur óheppin í dag. Hann fekk hondina á bæði brotsspørkini, men tíverri fór bæði í málið, segði Craig Brown.

– Skotland hevur eitt gott lið, og teir vóru eisini betri í hesum dystinum, men eg haldi, at sigurin var í so stórur. Umframt málini, sum Skotlandi skoraði, so høvdu teir ikki so nógvar kjansir, og føroyska liðið vardi væl.

– Eg dugi ikki at síggja nakra orsøk til at geva venjaranum skuldina fyri hetta tapið, tí tað vóru persónligir feilir á vøllinum, sum góvu Skotlandi málini. Hann hevði valt ein góðan taktikk, men tað ber illa til at verja seg fyri mistøkum hjá spælarunum, segði Craig Brown.

### Vónar at Føroyar fáa stig

Hóast avrikið hjá Føroyum leygardagin ikki stóð mát við undanfarnar dystir ímóti Skotlandi, so vildi Craig Brown ikki finnast at liðnum, men hann roknaði við, at Føroyar fáa aðrar truplar dystir.

– Eg havi hildið, at føroyska liðið hevur ment seg nógv hesi árini, og liðið mennir seg framvegis. Tað er ikki lætt at spæla í Føroyum – serliga á Toftum – og tað verður heldur ikki lætt hjá Skotlandi at fara til Føroyar næsta ár. Men tað verður hinvegin eisini sera trupult hjá Føroyum at spæla á útivølli ímóti Fraklandi, Italia og Ukraina.

– Eg vóni, at Føroyar fara at standa seg betur enn í hesum báðum fyrstu dystunum og fara at fáa okkurt stig, tí tað hava Føroyar uppiborið. Eg havi altíð sagt, at Føroyar hava verið tað mest sportsliga av øllum londunum, sum vit hava spælt ímóti. Sjálvt tá ið vit hava vunnið á Føroyum, hava spælararnir borið seg sømiliga og ítróttarliga rætt at, og tað er meira, enn vit kunnu siga um onnur lond.